Fleiri leiga hýru-vogn undir verkfallinum

Nú meðan verkfallið hevur staðið við, og lítið og einki brennievni hevur verið at fingið, hava hýruvognarnir havt nógv at gera. Men brennievni hevur í fleiri førum verið dýrt og trupult at fáa hendur á

HÝRUVOGNS-KOYRING
Magnus Gunnarsson

Um hesa árstíðina er ofta verkfall. Onnur ár, tá strandfarskipini ikki hava siglt, hava teir, sum eiga smáar útróðrar- og stuttleikabátar, siglt við ferðafólki, posti og frakt millum oyggjarnar. Hetta hevur givið teimum møguleika fyri eini eyka inntøku. Hesaferð er tað nakað annarleiðis, strandfaraskipini hava siglt, meðan ferðslan á landið hevur havt tað meira trupult. Tað, at lítið av bensini og dieselolju hevur verið at fingið, hevur havt við sær, at fólk hava verið noydd at seta privatbilin og leiga sær ein hýruvogn. Ikki allir hýruvognsførarar í Havn hava havt so lætt við at skaffa sær brennievni. Á bilstøðini Auto hava teir egna bensinsølu, sum teir einans hava brúkt til sínar egnu hýruvognar undir verkfallinum, so leingi tað hevur vart. Aðrir hýruvognsførarar hava verið á Sandoynni og bunkrað. Tað er dýrt brennievni íroknað ferðaseðilin við strandfaraskipinum. Eisini hava teir ligið fram við, tá bensin og olja hava verið at fingið í Kollafirði ella í Vestmanna.

So hvørt sum privatbilarnir blivu færri á gøtunum, vaks koyringin hjá hýruvognunum. Tá býbussarnir góvust í farnu viku, bleiv eftirspurningur eftir hýruvognum størri.

Hýruvognarnir í Havn hava ymiskar uppgávur at røkja sum t.d. koyring við blóðdonorum fyri Landssjúkrahúsið og koyring fyri Lágargarð

Hýruvognarnir hava havt nógva koyring undir verkfallinum

Stór kórvitjan úr USA

Hósdagin 12. juni kemur eitt stórt amerikanskt sangkór á vitjan í Føroyum. Talan er um The Calvary Choir, ið er úr samkomuni Calvary Church í Kalamazoo. Pastorur í samkomuni er John Monro, ið er giftur við føroyskari konu

KÓRVITJAN

Amerikanska sangkórið, The Calvory Choir, vitjar í Føroyum frá 12. til 16. juni. 56 fólk eru við í kórinum, sum fer at vitja í ymiskum samkomum í Føroyum. Pastorur í samkomuni er John Monro, ættaður úr Edenburgh í Skotlandi. Hann giftist í 1974 við Gudny, f. Gunnarsson, úr Havn, dóttir Jørghild, f. Thomsen, og Ingolf Gunnarsson. Gudny og John hava búð í USA síðan 1981, tey eiga sonin Christopher.

Calvary-sangkórið er úr samkomuni Calvary Church í Kalamazoo, Michigan í USA. Kalamazoo er býur við 70.000 íbúgvum í ein landsynning í statinum Michigan, góðar 100 km eystan fyri Chicago og vestan fyri Detroit. Her liggja læristovnarnir Western Michigan University og Kalamazoo College. Fleiri smærri býir liggja rundan um Kalamazoo, so fólkatalið í øllum økinum er oman fyri 300.000.

Calvary Bible-samkoman varð stovnað sum sjálvstøðug samkoma í 1929. Høvuðsmál samkomunnar er at vera og gera lærisveinar, sum sýna fram og kunngera Harran Jesus Kristus. Sangkórið er eisini kent fyri at halda fast við grundreglurnar í orði Guds. John Munro hevur verið leiðandi prædikumaður (pastorur) í Calvary Bible-samkomuni síðani í mai 1996.

Vanliga vitja fleiri enn 2000 fólk møtini hvønn sunnudag, og er hetta tal tvífaldað seinastu sjey árini. Samkomubygningar og aðrar eindir at virka frá umfata góðar 30.000 fermetrar á einum øki, ið er umleið 73.000 fermetrar til støddar.

At tilbiðja Gud er aðalmálið í lívinum í Calvary-samkomuni, og samkoman roynir at bera fram tilbiðjan og lovsong í einum bíbilskum, javnvigandi stíli, har Gud er miðdepil. Calvary-sangkórið umboðar hesa lívsáskoðan og er kjarnin í eini tónleikatænastu, sum eisini umfatar eitt orkestur, ið telur 30 limir, eins og fleiri lovsongsbólkar og ljómlið, handklokkukór og fleiri barnakór. Sangkórið syngur fyri tað mesta sunnumorgnar og hevur, ið hvussu er, tríggjar framførslur á eini árligari jólakonsert, ið er vorðið stak gott høvi til at røkka út til fólkið har um vegir. Calvary Bíble-sangkórið tók upp sína fyrstu ljómfløgu í mars 2001 við heitinum „Worship at Calvary… Live!" Tim Hathaway er sang- og tilbiðjanar-pastorur í CBC (Calvary Bible Church). Partur av ábyrgd hansara er at fyrireika og leiða lovsongin og at stjórna sangkórinum og tónleikarunum. Hann og kona hansara, Vicki, eiga tríggjar døtur.

Kórið syngur í hesum støðum:
Fríggjakvøldið 13. juni kl. 19.00 í Betesta í Klaksvík
Leygarkvøldið 14. juni kl. 20.00 í Siloa í Fuglafirði
Sunnudagin 15. juni kl. 10.30 í Lívdini í Hoyvíkar Skúla
Sunnukvøldið 15. juni kl. 18.00 í Ebenezer

Samkomu- og kórleiðarar, f.v. John Monro, pastorur, og konan, Gudny Monro, sum er úr Havn, Vicky Hathaway og maðurin, Tim Hathaway, sang og tilbiðjanarpastorur

ítróttur
Nr. 105 • fríggjadagur • 6. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Ivamálini eru í verjupartinum

Frammi á vøllinum eru eingi ivamál, meðan fimm spælarar eru við í kappingini um fýra pláss í verjuni

ÍSLAND–FØROYAR
Jóannes Hansen

Longu undan fráferðini úr Føroyum mikudagin tóktist tað rættuliga upplagt, hvussu føroyska liðið fer at verða mannað á miðvøllinum og í álopinum, tá ið tað í morgin fer at takast við grannarnar fyri vestan á Laugardalsvøllinum í Reykjavík.

Hóast hann eftir fýra umfør í landskappingini ikki enn hevur funnið vegin til netmeskarnar hjá mótstoðuliðunum – tað plagar hann annars at vera óførur til – so verður John Petersen annar av álopsmonnunum. Undir liðini á honum verður ivaleyst Andrew av Fløtum. Á miðvøllinum er einki at ivast í, at Jákup á Borg verður í høgra borði, og at Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson vera mitt fyri. Hesin seinni hevur saman við so nógvum øðrum B36 monnum ikki enn verið serliga væl upplagdur í heimligu kappingini, men tann, sum hevur verið fastur maður í sjey ár, og sum stendur á gáttini til at spæla landsdyst nummar 50, verður ikki settur av. Serliga ikki tá ið Ísland, sum hevur nógvar høvuðssterkar spælarar og nógvar spælarar, sum eru drúgvir í nærdystunum á liðnum, er hin parturin.

Miðvallarplássið í vinstru hevur verið ivingarsamt, síðani Øssur Hansen og Jens Kristian Hansen vóru fastir menn. Hjalgrím Elttør og Heðin á Lakjuni hava verið royndir í tí ódnini. Heðin fekk ikki boð hesa ferð. Hjalgrím kappast við Rógva Jacobsen um plássið, og tað er nógv, sum bendir á, at Rógvi verður tann drúgvari í tí kappingini. Hann stóð seg væl, tá ið hann fekk møguleikan í vinadystunum ímóti Kasakstan, og tað hevur ikki minsta týdningin, at hann hevur væl betri fyritreytir í høvuðspælinum – tað hevur hann longu víst fleiri ferðir í heimligu kappingini í ár – enn kappingarneytin.

Ivamálini

Um Jens Martin Knudsen ella Jákup Mikkelsen skal vera í málinum valdast hesa ferð, sum tað hevur gjørt seinastu nógvu ferðirnar, um, hvussu dagsformurin er. Jákup, sum ikki sleppur framat í bestu norsku deildini, var ikki tøkur í fyrra vinardystinum ímóti Kasakstan, og tá ið hann undan seinna dystinum var komin til Føroya, var hann so mikið skaddur í einum fingri, at tað ikki bar honum til at spæla. Lars Høgh venur teir báðar málverjarnar í Reykjavík, og hann fara Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen ivaleyst at fundast við, áðrenn teir taka avgerðina.

Jens Martin var málverji ímóti Skotlandi á heimavølli í fjør. Tá ið landsliðið spældi í Litava og Týsklandi var Jákup millum stólparnar, og hann var rættuliga sannførandi.

Fimm spælarar eru við í kappingini um tey fýra plássini í verjuketuni. Teir eru Christian Høgni Jacobsen, Jóhannis Joensen, Jón Rói Jacobsen, Johan Byrial Hansen og Súni Olsen. Um Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson høvdu verið tøkir hesa ferð, so hevði verjan ivaleyst sæð soleiðis út: Pól, Óli, Jón Rói og Súni. Nú eru Óli og Pól leikbannaðir, og tað hevur við sær, at talan verður um nýggja samanseting.

Á vongverjanum í høgru eru Christian Høgni og Jóhannis møguleikarnir. Venjararnir tykjast hella til Christian Høgna. Á vinstra vongverja eru Súni og Johan B. Hansen møguleikarnir. Í fyrstu atløgu er mest upplagda boðið, at Súni verður vongverji, og at Johan ella Jóhannis Joensen verður miðverji saman við Jón Róa

Síðsti møguleikin

Tað er eisini ein annar møguleiki, sum ikki hevur verið nevndur, men sum tað væl kann hugsast, at venjararnir umhugsa. Aftur og aftur hevur dentur verið lagdur á, at tað í 4–4–2 spælskipanini hevur sera stóran týdning at hava góðar fótbóltsspælarar í miðverjuni, og at teir eisini eru skjótir. Á yngru landsliðunum hevur Jógvan Martin Olsen fleiri ferðir havt Súna Olsen í miðverjuni. Tí er møguleikin ivaleyst og vendir á borðinum á gistingarhúsinum í Reykjavík, um Súni skal vera miðverji saman við Jón Róa.

Um tann loysnin hevði verið vald, so verður Johan B. Hansen í vinstra verjuborði. Har hevur hann spælt nógv í feløgunum, og hann hevur eisini røkt tað plássið á landsliðnum. Fyrimunirnir við hesi síðstu loysnini eru altso tveir skjótir og góðir bóltspælarar í miðverjuni.

Íslendingar eru góðir í luftspælinum, og um teir sleppa at leggja høgar sendingar í føroyska brotsteigin, so verða teir vandamiklir. Føroyingarnir á miðvøllinum og í verjuborðunum skulu syrgja fyri, at íslendingarnir ikki sleppa til longu og høgu sendingarnar innfyri føroyska málið. Um íslendingarnir sleppa at gera tað, sum teir ætla sær, so kann tað skjótt gerast rættuliga kostnaðarmikið. Jón Rói veit, hvat tað snýr seg um í luftspælinum, og Jóhannis og Johan er betri fyri í tí partinum, enn Súni er tað. Men føroysku spælarnir fara neyvan at megna at vinna luftbardaga ímóti íslendingunum, og um talan gerst um luftkríggj, so kann tað skjótt aftaná verða soleiðis, at semja verður um, at tað ikki var rætt, at Hans Fróði Hansen varð settur eftir í Føroyum.

Í blaðnum í morgin verður meiri at frætta frá okkara monnum í Reykjavík um, hvussu liðið fer at síggja út. Álopsódnirnar og miðvallarplássini er tað eingin ivi um. Hvør skal manna hinar ódnirnar verður vent og snarað á venjaraborðinum í Reykjavík í dag.

Jann Ingi Petersen, Atli Danielsen, Ingi Højsted og Jónhard Frederiksberg eru í hesum hugleiðingunum ikki nevndir sum møguleikar millum teir fyrstu ellivu í morgin. Teir eru, so plagdi maðurin at taka til, við fyri at læra!

Stóru ivamálini undan landsdystinum ímóti Íslandi leygardagin eru í verjuni. Sannlíkt er at GÍ-leikarin, Súni Olsen, verður ein av teimum fýra monnunum, sum skulu halda íslendingunum burtur frá føroyska málinum.

Mynd: Savnsmynd